**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Svartkalvi. Túrur nr. 1420.**
**Tíðarskeið: 21/5 - 4/6 – 2014.**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Lise H. Ofstad (fyrru viku), Mourits Mohr Joensen, Jens Arni Thomassen og Petur Steingrund (seinnu viku).

**Ábyrgd:** Petur Steingrund (kanningarleiðari).

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at kanna svartkalva: Nøgd, longd, vekt, aldur, kyn og kynsbúning. Umframt skuldu kanningar eisini gerast av øðrum fiskasløgum, sum vóru fingin.
Eisini var hitin við botn skrásettur. Nytru- og magaprøvar vóru eisini tiknir av longu og brosmu.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 135 mm posa, rockhopper grunnur, breitlar 120 m og Thyborøn-lemmar. Trolað varð vanliga í 4-6 tímar.

**Um túrin:**
Fóru av Havnini hósdagin 22/5 kl. 13 og byrjaðu at royna í landsynningskantinum á føroyska landgrunninum og tóvaðu suðureftir móti Munkagrunninum. Royndu í vestara kanti á Munkagrunninum 24/5 og fóru suður aftur á endan 25/5. Tóvaðu síðan norðureftir í eystara kanti til 26/5, tá vit fóru inn at landa. Byrjaðu aftur at fiska 28/5 í norðara kanti og tóvaðu eystureftir. Fóru síðan suðureftir í eystara kanti og vóru 30/5 í sunnara kanti á Munkagrunninum. Tann 31/5 fóru vit í vestara kant á Munkagrunninum men fóru 2/6 suður aftur á endan og endaðu í eystara kanti 3/6. Vórðu á Havnini eftir loknan túr týsdagin 3/6 kl. 12:15 og landaðu á Bacalao. Tilsamans 31 hál vórðu góðkend og gjørd upp. Veðrið var gott tað mesta av túrinum.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu og nytrur (Talva 1) er víst niðanfyri.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 6. juni 2014.

**Fyribilsúrslit:** Tað var væl at fáa av svartkalva, júst tað sama sum í fjør (Talva 1), sum var eitt gott ár. Tað sama varð at fáa av trantkongafiski, meðan nógv meira var at fáa av stóra kongafiski. Fleiri magar vórðu kannaðir, og nógvir svartkalvar høvdu etið svartkjaft, meðan ein einstakur hevði etið makrel. Tað var væl av makreli at síggja í vatnsskorpuni á Munkagrunninum og eisini eystan fyri Føroyar, tá vit sigldu inn. Ein brugda var eisini sædd.

**Talva 1**. Veiða (kg), og nytrur/magar tikin á túri 1420.

| FISKASLAG | 2014 31 hál KG | Nytrur | Magar | 2013 18 hál KG | Lutfall KG per hál |
|---|---|---|---|---|---|
| SVARTKALVI | 27043.24 | 500 | 71 | 15661.46 | 1.00 |
| TRANTKONGAFISKUR | 7543.95 | | | 4198.96 | 1.04 |
| TINDASKØTA | 3438.48 | | | 2073.38 | 0.96 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 1912.13 | | | 139.20 | 7.98 |
| HALAHVASSA SKØTA | 732.37 | | | 244.01 | 1.74 |
| BROSMA | 678.08 | 271 | 47 | 386.37 | 1.02 |
| BLÁLONGA | 615.90 | | | 216.52 | 1.65 |
| HVÍTASKØTA | 405.43 | | | 81.83 | 2.88 |
| BLÁGÓMUR | 364.57 | | | 199.73 | 1.06 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 271.61 | | | 126.97 | 1.24 |
| LONGA | 214.71 | 44 | 3 | 25.34 | 4.92 |
| SVARTKJAFTUR | 203.61 | | | 111.40 | 1.06 |
| UPSI | 143.94 | | | 76.89 | 1.09 |
| GULLAKSUR | 77.65 | | | 13.27 | 3.40 |
| HAVTASKA | 75.89 | | | 0.00 | |
| TOSKUR | 63.75 | | | 47.10 | 0.79 |
| LÁLLA | 62.40 | | | 44.94 | 0.81 |
| LIRI | 59.86 | | | 28.63 | 1.21 |
| KLINGRUSKØTA | 55.48 | | | 29.28 | 1.10 |
| LÍTLA BROSMA | 27.18 | | | 0.00 | |
| ÍSHAVSSKØTA | 17.85 | | | 0.00 | |
| SKRAMBUL | 17.06 | | | 0.00 | |
| SKØTA | 12.45 | | | 0.00 | |
| HVASSASPREK | 10.66 | | | 10.50 | 0.59 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 10.53 | | | 0.00 | |
| ULVFISKUR | 10.35 | | | 1.30 | 4.62 |
| LÝSINGUR | 9.45 | | | 0.00 | |
| SVARTFISKUR | 3.66 | | | 0.00 | |
| KRYTTLINGUR | 0.35 | | | 0.00 | |
| SILVURMURTUR | 0.18 | | | 0.00 | |
| RÆKJA | 0.08 | | | 0.00 | |
| MJÁI PRIKKAFISKUR | 0.07 | | | 0.00 | |
| TILSAMANS | 44082.87 | 815 | 121 | | |

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru at finna í dokumentinum Tur1420d.doc.

Petur Steingrund